Fylgiskjal 4

## Sólgerð Hjørleifsdóttir

**Fra:** Jósup Henriksen
**Sendt:** 11. december 2019 11:01
**Til:** Elsa Magnussen
**Emne:** SV: Til hoyringar: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om børns retsstilling og uppskot til kunngerð um broyting í bekendtgørelse om behandling af faderskabssager m.v.

Hey Elsa

Orsaka, at okkara hoyringssvar ikki kom innan freistina. Hetta var ein feilur frá okkara síðu.

Men vit takka fyri høvið at gera viðmerkingar og gott samskifti í tilgongdini. Vit taka undir við lógaruppskotinum og hava annars ikki fleiri viðmerkingar.

Vinaliga


GJALDSTOVAN

**Jósup Henriksen**
Løgfrøðiligur ráðgevi / Legal advisor
Talgildu Føroyar / The National Digitalisation Program
TELEFON +298 352400 | BEINLEIÐIS +298 352483


**Fra:** Talgildu Føroyar <talgildu@talgildu.fo>
**Sendt:** 12. november 2019 09:46
**Til:** Jósup Henriksen <josup@talgildu.fo>; Nicolai Mohr Balle <nicolai@talgildu.fo>; Lilly Dam Hanssen <lilly@talgildu.fo>
**Emne:** VS: Til hoyringar: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om børns retsstilling og uppskot til kunngerð um broyting í bekendtgørelse om behandling af faderskabssager m.v.

ttk


GJALDSTOVAN

**Durita Hansen**
TELEFON +298 352400 | BEINLEIÐIS +298 352457


**Fra:** Elsa Magnussen <elsa.magnussen@amr.fo>
**Sendt:** 12. november 2019 09:38
**Til:** Familjufyrisitingin <famf@famf.fo>; dat@dat.fo; Talgildu Føroyar <talgildu@talgildu.fo>
**Emne:** Til hoyringar: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om børns retsstilling og uppskot til kunngerð um broyting í bekendtgørelse om behandling af faderskabssager m.v.

Góðan dagin

Við hesum verður sent tykkum til hoyringar:

- uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om børns retsstilling (Váttan av faðirskapi)
- uppskot til kunngerð um broyting í bekendtgørelse om behandling af faderskabssager m.v. (Váttan av faðirskapi).

Endamálið við lógaruppskotinum er at strika kravið um at møta persónliga á Familjufyrisitingini fyri at vátta faðirskapin at einum barni. Í staðin verður ásett, at hetta verður gjørt skrivliga í einari váttan, sum verður send Familjufyrisitingini.

Somuleiðis verður ásett, at ein pápi við elektroniskari undirskrift kann vátta faðirskapin at einum barni, tá ið Tænastuportalurin og talgildi samleikin eru klár at taka í nýtslu í 2020.

Nýggja skipanin við váttan av faðirskapi verður skipað í kunngerð, bekendtgørelse om behandling af faderskabssager m.v. Tá ið Tænastuportalurin og talgildi samleikin eru klár at taka í nýtslu, verður neyðugt at broyta kunngerðina samsvarandi.

Møguligar viðmerkingar skulu sendast til Almannamálaráðið á teldupost amr@amr.fo ella til Elsu Magnussen, fulltrúa, á teldupost elsa.magnussen@amr.fo í seinasta lagi týsdagin 10. desember 2019.

Um spurningar ella ivamál eru, frætti eg fegin nærri.

Vinarliga/Sincerely

Elsa Magnussen
*Fulltrúi/Head of Section*

Almannamálaráðið/Ministry of Social Affairs
Eirargarður 2 • 100 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. +298 304000 • Direct +298 734058
elsa.magnussen@amr.fo • www.amr.fo